## Tátta takið um grunnar

ES-nevndin vil hava betri tamarhald á teimum nógvu kapitalgrunnunum einstaklingum, sum gera ovurstórar íløgur. Charlie McCreevy, sum er kommiserur í málum viðvíkjandi tí innara marknaðinum hjá ES, sigur við Reuters, at tað er neyðugt hjá myndugleikunum at halda eyga við einstaklingum, sum hava ræðið á ovurstórum upphæddum í ymsum grunnum. Kommiserurin sigur, at persónar í slíkum størvum eiga at lata myndugleikunum allar upplýsingar, um teir framhaldandi ætla sær at virka í ES. Men øll eru ikki nøgd við reglurnar. Eitt nú sigur Poul Nyrup Rasmussen, at tað eru so mong hol í reglunum, at hann skýrir tær "ein sveisaraost".



## Karnevalurin aftur á Eystanstevnu

Aftur í ár fara ítróttarfólk og skótar at ganga karnivalsgongu í Runavík. Heldur enn at hava vanligu skrúðgonguna leygardagin, hava fyriskipararnir avgjørt at eyndurtaka hittið frá í fjør við at skipa fyri einari karnevalsgongu áðrenn stevnan verður sett. Fríggjakvøldið 19. juni - á Eystanstevnu verður stóra karnevalsgongan við hundraðtals fólkum. Í karnevalsgonguni verða ítróttarfólk, skótar o. o. sum vanliga eru partur av skrúðgonguni. Ítróttarfólkini og skótarnir fara at hava hvørs sítt »show«, og eisini fara fleiri maskottar og annað spennandi at luttaka í gonguni sum fyriskiparnir ikki vilja avdúka enn.

# Døpur útlit fyri Kósini í Klaksvík

**Christian Andreasen, advokatur, sum hevur eftirlitið við gjaldssteðginum hjá P/F Kósini, sigur, at enn er eingin loysn fingin á viðurskiftunum hjá stóra flakavirkinum í Klaksvík. Orsøkin er, at tað er trupult at fáa váðafúsan kapital til endurreisn av virkseminum**

GJALDSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Enn eru vit ikki komin til nakra endaliga niðurstøðu um framtíðina hjá flakavirkinum, og tað er torført hjá mær í løtuni at siga, hvussu langa tíð aftrat hetta fer at taka.

Tað sigur Christian Andreasen, advokatur, sum vegna Skiftirættin hevur eftirlitið við gjaldssteðginum, sum P/F Kósin fór í 17. desember í fjør.

- Eg kann siga, at allur eginpeningurin í felagnum er mistur, og í seinastuni hava vit arbeitt við at fáa íleggjarar, sum vilja koma við váðafúsum kapitali. Hetta hevur ikki – ella ikki í nóg stóran mun - eydnast higartil, og tí er so tørført at siga í løtuni, hvussu verður.

Christian vísir á, at tíðirnar at savna inn eginpening ikki eru góðar, nú fíggjarvánirnar gera, at varsemi er so stórt.

- Tað hevur tí heldur ikki víst seg at vera lætt at fáa neyðuga kapitalin, sum skal til fyri at endurreisa virksemið á Kósini, leggur hann aftrat.



*- Í prinsippinum kann P/F Kósin vera í gjaldssteðgi í mesta lagi í eitt ár, men eg vænti ikki, at verandi gjaldssteðgur verður longdur, sigur Christian Andreasen, advokatur*



*Lítið bendir á, at nøkur loysn fæst á fíggjarligu viðurskiftunum hjá flakavirkinum á Kósini, áðrenn gjaldssteðgurin gongur út 17. juni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Uppí eitt ár

Tað er Skiftirætturin, sum hevur lýst gjaldssteðgin hjá Kósini, og tað er Skiftirætturin, sum eigur avgerðina um, hvussu langur gjaldssteðgurin verður, tá saman um kemur.

Christian Andreasen sigur, at longdi gjaldssteðgurin hesaferð varar fram til 21. juni, men Skiftirætturin kann leingja steðgin í mesta lagi upp í eitt ár – við trimum mánaðum í senn.

- Hetta merkir, at í prinsippinum kann P/F Kósin vera í gjaldssteðgi heilt fram til 17. desember í ár, men eg rokni ikki við, at so verður.

Advokaturin væntar ikki, at gjaldssteðgurin, sum nú er galdandi í nakrar vikur aftrat, enn einaferð verður longdur.

Og so má helst antin bera ella bresta hjá P/F Kósini.

Christian Andreasen sigur, at óhugsandi er ikki, at felagið verður lýst á tvingsilssølu, um eingin loysn verður fingin í hús fyri 17. juni.

### Eingin flyting

Tá eitt felag verður lýst í gjaldssteðg, og Skiftirætturin setir advokat at hava eftirlit, fer eingin flyting og eingin fíggjarlig "dispotión" fram í felagnum uttan um advokatin.

- Í hesum førinum, nú roynt verður at útvega eginpening til endurreisn, er mín uppgáva eitt nú at virka fyri áhugamálunum hjá kreditorum, leiðslu og møguligum íleggjarum, sigur Christian Andreasen, advokatur.

# Alt rýkur ikki við Kósini

**Christian Andreasen, advokatur, sigur, at P/K Kósin er eitt sjálvstøðugt felag, og fer felagið í ringasta føri á húsagang, merkir tað ikki, at tað neyðturviliga tekur onnur feløg hjá Maru Seafood við sær**

GJALDSSTEÐGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært Christiani Andreasen, advokati, sum vegna Skiftirættin hevur eftirlitið við gjaldssteðginum hjá P/F Kósini, er enn ikki komið á mál við eini møguligari endurreisn av stóra fiskavirkinum í Klaksvík.

Ógreitt er eisini í løtuni, hvussu langt kann komast, áðrenn gjaldssteðgurin, sum nú er galdandi, gongur út 17. juni í ár.

Hatturin omanyvir virkseminum, sum var á Kósini, Norðís Seafood á Eiði og línuskipunum, Grana og Fugltúgvuni, er Maru Seafood, har Jóhan Páll Joensen er stjóri.

Vit spurdu tí Christian Andreasen, advokat, um alt virksemið hjá Maru Seafood rýkur, um flakavirkið á Kósini í ringasta føri fer á húsagang.

- Nei, P/F Kósin er eitt sjálvstøðugt felag, sum ikki av sær sjálvum tekur restina av virkseminum hjá Maru Seafood við sær.

Hann vísir á, at P/F Kósin er so mikið leys av restini av virkseminum hjá samtakinum Maru Seafood, at hon ikki av sær sjálvum tekur fiskavirkið á Eiði og línuskipini við sær.

Advokaturin dugir í løtuni ikki at siga, um ein loysn fæst á fíggjarligu trupulleikunum hjá Kósini, áðrenn gjaldssteðgurin gongur út.